# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK
TLF 341800

*– Bæði slangur, alligatorar, varanar og krokodillur hava fingið av bita av mær*

*Steve Irwin*

# The Crocodile Hunter deyður

**Hann bardist og beistaðist við eitrurslangur og stórar krokodillur, og fleiri teirra fingu ein bita burtur av honum. Í morgun beindi ein tindaskøta fyri Steve Irwin**

Tað var ikki so løgið, at avstralska løgreglan lýsti deyðsfallið sum sera óheppið. Steve Irwin hevði verið í mongum leiki við eitrandi slangum og risastórum krokodillum, og so bleiv tað at enda ein skøta, sum beindi fyri honum.

Í morgun var hann saman við myndamonnum og øðrum í ferð við at taka upp eina sjónvarpssending við Great Barrier Reef uttan fyri Port Douglas á avstralsku eysturstrondini, tá ein tindaskøta brádliga stakk hann í bringuna. Læknar vórðu boðsendir beinanvegin, men har var einki at gera. Steve Irwin var deyður. Tað var klokkan trý í nátt okkara tíð.

Tá høvdu myndugleikarnir sent eina tyrlu við bjargingarfólki til eina lítla oyggj har á leiðini, men tey kundu bara staðfesta, at tann 44 ára gamli Irwin var deyður, sigur sjónvarpið ABC.

– Skøtan stakk hann í bringuna. Helst doyði hann av hjartasteðgi, sigur kavarin Steve Edmondson, sum var hjástaddur, tá tann kendi náttúruvinurin doyði.

Tindurin á halanum á tindaskøtuni er eitrandi og ógvuliga hvassur. Tá skøtan kennir, at hon er í vanda, hendir tað, at hon slær við halanum fyri at verja seg. Ivaleyst var tað tað, sum hendi við Great Barrier Reef í morgun.



*Soleiðis munnu mong minnast Steve Irwin sum „The Crocodile Hunter“*

### Heimskendur

Steve Irwin gjørdist kendur um allan heimin fyri sínar náttúrusendingar, og tað var serliga hansara sermerkti framferðarháttur, sum gjørdi bæði hann og sendingarnar væl umtóktar. Hann var sera djarvur og beistaðist ofta við eitrandi slangur og stórar krokodillur, sum var tað eitt spæl.

Fyri tveimum árum síðani var hann fyri hvøssum atfinningum, tí hann hevði sín ein mánað gamla son í ørmunum, meðan hann beistaðist við eina krokodillu. Men sjálvur helt Irwin uppá, at sonurin var ongantíð í vanda.

Fleiri vildu eisini vera við, at hann órógvaði pingvinir, kópar og onnur djór, tá hann gjørdi eina sjónvarpssending í Antarktis. Men eisini hesaferð vísti hann atfinningunum aftur, og hóast tey atfinningarsomu løgdu málið fyri avstralsku umhvørvismyndugleikarnar, tóku teir ikki málið upp.

### Ofta nær við

Meiri enn eina ferð var Steve Irwin í lívsvanda, og í einari samrøðu bleiv hann spurdur, hvat var tann vandamesta støðan, sum hann hevði verið í.

– Tað hevur ofta verið nær við. So ofta, at tað ber ikki til at taka ein tilburð burturúr, svaraði hann.

Í teirri somu samrøðuni bleiv hann spurdur, um hann nakrantíð hevði fingið skaða av at hava beistast við djór.

– Ja, fleiri ferðir. Bæði krokodillur, varanar, alligatorar og fleiri hundrað slangur hava fingið ein bita burtur av mær.

### Ikki deyður!

Tað hevur fleiri ferðir ljóðað, at Steve Irwin var deyður, tí ein krokodilla ella ein slanga hevði gjørt av við hann. Í einari samrøðu við Animal Plamet gjørdi hann gjøldur burtur úr søgunum:

– Eg havi ongantíð fingið slangueitur í meg. Herfyri frætti eg, at eg var deyður. Onkur vildi vera við, at ein eiturslanga hevði gjørt av við meg, onkur annar segði, at tað var ein krokodilla, og uppaftur onnur vildu vera við, at tað var ein eiturkoppur, sum hevði birið meg so meint, at eg doyði. Nei, skal eg siga tykkum. Steve Irwin er á framvegis á lívi, segði hann við Animal Planet fyri fýra árum síðani.

Fýra ár seinni tók ein skøta lívið av avstralska náttúruvininum og ævintýraranum.

Steve Irwin og konan Terri giftust í 1992, og tey fingu eina dóttur og ein son.

# Skulu bjarga Deyðahavinum

**Vandi er fyri, at Deyðahavið fer at torna upp, men nú ætla ísraelsmenn og jordanar at bjarga tí sermerkta vatninum.**

Tey seinastu 50 árini er Deyðahavið minkað nógv, og serfrøðingar siga vanda vera fyri, at tað fer at torna upp.

Men nú hava jordanski kongurin biðið bretska arkitektin Lord Foster gera eitt uppskot um, hvussu tað sermektra vatnið kann bjargast. Uppskotið hjá Foster er at leiða sjógv úr Reyðahavinum í Deyðahavið ígjøgnum eina veit, sum skal gravsst tvørtur um Sinai-oyðimørkina, skrivar The Times.

Útrokningar vísa, at Deyðahavið er minkað ein triðing tey seinastu 50 árini. Vatnið er sera væl umtókt ferðamál, og teir jordansku, ísraelsku og palestinsku myndugleikarnir vilja fegnir varðveita inntøkurnar frá ferðafólkunum, sum á hvørjum ári leita sær til Deyðahavið. Teir hava eisini játtað at býta útreiðslurnar av at bjarga vatninum, og fyribils verður mett, at tað fer at kosta einar 15 milliardir krónur.

Umhvørvisfólk eru ikki so fegin um bjargingarætlanina. Tey stúra fyri, at tann serliga evnafrøðiliga blandingin í Deyðahavinum verður oyðiløgd, um sjógvur úr Reyðahavinum verður leiddur í vatnið.